# Sosialurin

Nr 225 mikudagur • 21. november 2001 • 75. árgangur • Kr. 12,00

Pedagogar í verkfalli:

## Halda mótpartin vera ósakligan



Síða 5

www.sosialurin.fo





Løgmaður í øðini inn á varaløgmann:

## Høgni spælir hasard við Føroyum

OLJA

*Jan Müller*

Løgmaður heldur, at varaløgmaður skaðar føroyingar við at føra fram, at ognarrætturin til oljuna er ivasamur.

- Man kann ikki fyrst samtykkja eina kolvetnisskattalógávu, eina loyvisrundu og samtíðis sáa iva um, hvør eigur oljuna. Ger man tað, so undirgrevur man sítt egna støði, og tað er einki minni enn at spæla hasard við landi og fólki.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, heldur málið vera ógvuliga álvarsligt. - Er man komin hartil, at løgtingið hevur samtykt eina lóggávu, sett hana í verk, boðið út o.a., uttan at hava heimild til tað, uttan at eiga rættin til tað, ikki at hava lóggávuøkið og dispositiónsrættin, so er alt samfelagið á ridlandi grund.

# Oljan misbrúkt í valstríðnum

**Høgni Hoydal, varaløgmaður, sáar enn einaferð iva um ognarrættin til oljuna við at siga, at danir ikki viðurkenna hendan ognarrætt. - Hetta er ein grov reinging av veruleikanum. Tað er als einki hald í pástandinum um, at vit ikki eiga allan rætt, sum vit hava brúk fyri til oljuna - vit kunnu útvinna oljuna, vit kunnu selja oljuna og gera við hana, hvat vit vilja, sigur Halgir W. Poulsen, advokatur, sum var við at fáa undirgrundaravtaluna heim til Føroya í 1992**

Síða 10–11















Løgmaður í øðini inn á varaløgmann:

# Høgni Hoydal misnýtir oljuna í valstríðnum

**-Tá varaløgmaður alment sáar iva um ognarrættin til oljuna setur hann til viks alla ta lóggávu, sum er gjørd á Føroya løgtingi, og sum er grundarlagið undir øllum. Tað er fullkomiligt hasard at misbrúka olju í valstríðnum á henda hátt, tí sjálvandi hava vit fingið ognar- og ræðisrættin til oljuna sigur løgmaður, ið umhugsar, hvørjar avleiðingar útspælið hjá varaløgmanni skal fáa í landsstýrinum**

VAL OG OLJA
*Jan Müller*

Í stórari lýsing í Dimmalætting valdagin sáar Høgni Hoydal, varaløgmaður iva um, hvør eigur oljuna í føroysku undirgrundini. Hann vísir á, at danska stjórnin viðurkennir framvegis ikki, at føroyska tjóðin hevur ognarrættin til oljuna og ger harvið til einkis avtaluna, sum er gjørd millum Danmark og Føroyar um, at Føroyar hava fullan ognarrætt til ráevnini í undirgrundini. Nakað, sum bæði fólkatingið og forsætisráðharrin hava staðfest. Anfinn Kallsberg, løgmaður er púra ovfarin av, at varaløgmaður brúkar slíkt í valstríðnum og umhugsar hann nú, um og hvørjar avleiðingar hetta skal fáa fyri samstarvið í landsstýrinum. Løgmaður metir úttalilsini hjá varaløgmanni so mikið álvarslig, at hann skjótast fer at taka ein fund við varaløgmann um málið. Hann ætlar so ikki, at hetta skal standa ósvarað. Tíðin fer at vísa, um tað skal fáa avleiðingar fyri varaløgmann.



- Tað er púra burturvið at siga slíkt. Tá varaløgmaður fer út alment við slíkum póstandum setur hann til viks alla ta lóggávu, sum er gjørd á Føroya løgtingi, og sum er grundarlagið undir øllum. Tað er fullkomiligt hasard at skriva slíkt, tí sjálvandi hava vit fingið ognar- og ræðisrættin til oljuna sigur løgmaður, ið heldur tað vera ómetaliga langt úti, tá sjálvur varaløgmaður í valstríðnum gamblar við ognarrættinum til ráevnini í undirgrundini. Tað er ógvuliga hugstoytt og heilt langt úti at brúka ein so álvarssaman spurning sum rætt føroyinga til oljuna í einum valstríði.

Løgmaður sigur, at Høgni Hoydal við hesum bara kann skaða føroyingar. Og hann heldur fram:

- Man kann ikki fyrst samtykkja eina kolvetnisskattalóggávu, eina loyvisrundu og samtíðis sáa iva um, hvør eigur oljuna. Ger man tað, so undirgrevur man sítt egna støði, og tað er einki minni enn at spæla hasard við landi og fólki.

Anfinn Kallsberg, løgmaður heldur málið vera ógvuliga álvarsligt. - Er man komin hartil, at løgtingið hevur samtykt eina lóggávu, sett hana í verk, boðið út o.a. uttan at hava heimild til tað, uttan at eiga rættin til tað, ikki at hava lóggávuvøkið og dispositiónsrættin, so er alt samfelagið á riðlandi grund.

Anfinn Kallsberg, løgmaður sigur, at við hesum noktar varaløgmaður og Tjóðveldisflokkurin í veruleikanum at viðurkenna ein sáttmála, sum er gjørdur undir Heimastýrislógini. Og tað er í sjálvum sær álvarsligt, tí tað er løgtingið, sum hevur samtykt avtaluna um yvirtøku av ráevnunum í undirgrundini, og tað hevur varaløgmaður ikki loyvi til at sáa iva um.

- Eg kann tí als ikki góðtaka, at varaløgmaður fer út alment við einum slíkum úttalilsi, sum sáar iva um, hvør eigur oljuna. Hetta er at undirgrava tað, sum løgtingið byggir á.

Løgmaður sigur, at í síni verð er eingin ivi um, at føroyingar eiga bæði lóggávurætt og ognarrætt til ráevnini í undirgrundini, og tað er tað sum løgtingið hevur samtykt og sum øll oljulóggávan byggir á. Og sum øll útbjóðingin gongur út frá og er tað út frá hesum, ið vit vóna at fáa eina komandi oljuvinnu.

- Tí er útspælið frá varaløgmanni og formanni Tjóðveldisfloksins óseriøst villeiðandi valgass.

Í lýsingini í Dimmalætting verður víst til úttalilsini hjá Frank Jensen, løgmálaráðharra, ið hevur sagt, at føroyingar hava ikki fingið ognarrættin til undirgrundina. Hesum er løgmaður ikki ósamdur í, tí ognarrættin til undirgrundina fáa vit bert við at taka fullan suverenitet. Men hvat ognarrættinum til ráevnini í undirgrundini, sum avtalan gongur út upp á, viðvíkur, so hevur fólkatingið váttað, at tann avtalan er endalig og at føroyingar eiga ráevnini í undirgrundini sigur løgmaður og vísir á, at tað er samsvar millum tað Frank Jensen sigur og veruleikan. Men hetta verður mistulkað, tá hugtøkini ognarrætt til undirgrund og ognarrætt til ráevnini í undirgrundini verða blandað saman.

## Lýsingin hjá Høgna Hoydal og Tjóðveldisflokkinum




Lýsingin sum talan er um og sum viðmerkingar verða gjørdar til í blaðnum er soljóðandi:

Oljan er okkara

Olja er funnin. Men tann 15. mars í ár var undirgrundaravtalan millum Føroyar og Danmark til umrøðu í Fólkatinginum og tá segði Frank Jensen løgmálaráðharri: - Det færøske hjemmestyre har med råstofaftalen alene fået overdraget den lovgivende og administrative kompetanse. Der er således ikke med aftalen tale om overdragelse af ejendomsretten over undergrunden på Færøerne”.

Við øðrum orðum, danska stjórnin viðurkennur framvegis ikki at føroyska tjóðin hevur ognarrættin til oljuna. Verður hesin spurningur ikki endaliga avgreiddur stendur fyri framman eitt eljusttríð um ognarrættin til hetta ríkidømið. Tað er bert ein máti at sleppa undan hesum stríði. Tað er at taka við skeytinum til okkara land og gerast sjálvstøðugt fullveldisríki. Tá valdar eingin ivi. Slepp okkum undan einum stríði um oljuna. Stuðla sjálvsstýrisgongdini í dag. Vel Tjóðveldisflokkin.

# Ábyrgdarleyst av varaløgmanni



*Halgir W. Poulsen, advokatur: Vallýsing hjá Høgna Hoydal og Tjóðveldisflokkinum um oljuna er reinging av veruleikanum*

**- Hatta er ein grov reinging av veruleikanum. Tað er als einki hald í pástandinum um, at vit ikki eiga allan rætt sum vit hava brúk fyri til oljuna – vit kunnu útvinna oljuna, vit kunnu selja oljuna og gera við hana, hvat vit vilja sigur Halgir W. Poulsen, advokatur um vallýsing hjá Høgna Hoydal**

VAL OG OLJA
*Jan Müller*

Halgir W. Poulsen, advokatur, sum var við í samráðingunum við danir um yvirtøku av ráevnunum í undirgrundini er sjokeraður av útmeldinini hjá Høgna Hoydal í vallýsing í Dimmalætting valdagin, har varaløgmanni sáar iva um, hvør eigur møguliga olju í undirgrundini og sigur, at danir hava ikki viðkent okkara ognarrætt til ráevnini.

- Hatta er ein grov reinging av veruleikanum. Tað er als einki hald í pástandinum um, at vit ikki eiga allan rætt sum vit hava brúk fyri til oljuna – vit kunnu útvinna oljuna, vit kunnu selja oljuna og gera við hana, hvat vit vilja. Einasta skylda vit hava móti Danmark er eftir míni meining tann grundleggjandi andstendigheit, at vit siga við Danmark, tá vit hava nokk av inntøkum av olju, at nú skulu vit ikki hava meira sosialhjálp frá teimum.

Halgir W. Poulsen heldur tað vera ábyrgdarleyst og ótrúliga groft av Høgna Hoydal, sum næstovasta mann í landinum at kasta tann brandin út aftur nú aðru ferð innan fyri eitt hálvt ár, um at vit ikki eiga ognarættin til oljuna - og serliga tá allur umheimurin vendir eyguni móti Føroyum, nú olja er funnin her.

# Óheppið á sáa iva



*Herálvur Joensen, stjóri í Oljumálastýrinum*

OLJA OG VAL
*Jan Müller*

Herálvur Joensen, stóri í Oljumálastýrinum ivast ikki í, at føroyingar hava fingið og eiga rættin til oljuna, tvs. til ráevnini í undirgrundini. Hetta var eisini tað hann útalaði til dansdka sjónvarpið í vikuni. - Núverandi stjórnin og forsætisráðharrin hava staðfest, at tey stóu við avtaluna frá 1992. Tí hava vit onga grund til at ivast í tí leggur hann aftrat.

Herálvur Joensen heldur tað ikki vera serliga heppið, tá tað verður sáddur ivi um tær avtalur við hava gjørt við Danmark og sum m.a. eru grundarlag undir okkara egnu lógum og reglum mótvegis oljufeløgunum.

Herálvur Joensen sigur, at hvørja ferð ivi verður sáddur um vit eiga rættin til ráevnini so spyrja oljufeløgini, sum hava fingið undirdeildir í Føroyum, um tað eru føroyingar tey skulu samráðast við. Og hann heldur fram:

- Tað kann ikki tæna føroyskum áhugamálum alla tíðina sjálvir at ganga og sáa iva um vit nú hava tann myndugleika, sum vit útinna sigur stjórin í Oljumálastýrinum, sum sjálvur er bangin fyri, at tað skaðar meira enn tað gagnar.

Amerada Hess:

# Frálíkt úrslit

**Stjórin fyri Amerada Hess í Stóra Bretlandi er ikki í iva um, at hetta er eitt frálíkt úrslit, ið teir nú hava fingið í Føroyum. Hann ávarar, eins og aðrir, ímóti at gleða seg ov nógv longu nú**

OLJULEITING
*Heri á Rógvi*

- This is a great result. We're delighted that the Faroese Partnership's first well in the Faroes has been succesful and we look forward to following up on this succes with our drilling programme next year, sigur Nick Fairbrother, sum er stjóri fyri Amerada Hess í Stóra Bretlandi.

Í tíðindaskrivinum frá Amerda Hess kontórinum í Bretlandi verður sagt, at fleiri kanningar skulu til fyri heilt at kunna avgera lagnuna hjá brunninum, men tað er einki yvir at dylja, at teir tykist heilt væl nøgdir við úrslitið. Tað verður lagt aftur, at heilt fitt av arbeiði afturat skal til fyri at sláa fast, um hetta nú er rakstrarvert.

Í tíðindaskrivinum nýtur Hess eisini høvi til at endurgeva bæði Ben Arabo og Wilhelm Petersen.

Amerada Hess vænta, at komandi kanningar fara at siga teimum meira um brunnin í Føroyum.

Dong:

# Positivt úrslit

**Danska oljufelagið Dong, sum eigur góð 28 prosent av verkætlanini hjá Faroese Partnership, sigur í tíðindaskrivi, at hetta er eitt positivt úrslit, men serligu fortreytirnar í Føroyum kunnu ávirka, um hetta verður rakstrarvert**

OLJULEITING
*Heri á Rógvi*

Í Faroese Partnership eru Amerada Hess, British Gas, Dong og Atlantic Petroleum. Eftir at royndarboringarnar høvdu tikið teir 3.800 niður undir havbotnin, so valdu tey trý, Amerada, Dong og Atlantic Petroleum at halda áfram at bora longu niður í einari sokallaðari Sole Risk-operation.

Í tíðindaskrivi, so siga Dong, at teir eru bæði stoltir og fegnir um úrslitið. Serliga tað, at vágin nú hevur givið úrsliti og hetta endurspeglar teirra tekniska førleika.

- Med udgangspunkt i de tekniske undersøgelser og analyser vi foretog i området forud for boringen, har vi arbejdet ud fra en anden teori end de øvrige selskaber, og resultatet her viser, at vores vurdering var rigtig. Det er vi selvfølgelig stolte af, for det bekræfter, at vores ekspertise fuldt ud kan måle sig med andre og større selskabers. Men set fra DONG's side – der også har licenser i onrådet på britisk side – så er det virkeligt positive, at vi nu har konstateret, at der er olje og gas omkring Færøerne, sigur Søren Gath Hansen í tíðindaskrivinum.

Dong enda tíðindaskrivið við at minna á, at viðurskifti við Føroyar skulu kannast betri, og hesar eins og aðrar kanningar vilja endaliga vísa, um hetta er rakstrarvert.